**Roknskapargreining fyri mjólkarvinnuna**

**2014 – 2018**
**(2014/15 – 2018/19)**

mars 2020

# INNIHALDSYVIRLIT

**Síða**

**Frágreiðing** .......... 3

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini** .......... 5

**Rakstrarroknskapirnir 2014 – 2018 (2014/15 – 2018/19)** .......... 6

**Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)** .......... 10

**Hvar er mjólkarframleiðslan í Føroyum?** .......... 16

**Frágreiðing**

Í greiningini hava vit valt at hyggja at almennu ársroknskapunum hjá teimum mjólkarbøndum, sum hava lagt raksturin í smápartafeløg. Øll smapartafeløgini eru við í greiningini fyri árini 2015 – 2019 (2014/15 – 2018/19).

Greiningin er fyrst og fremst gjørd til tey, ið starvast í hesi vinnuni, og annars tey, ið hava áhugamál í vinnuni. Tað eru ikki gjørdar djúptøknar útrokningar, sum møguligir peningastovnar og fíggjarfrøðingar gera, men tilfarið er tøkt, so hesir áhugabólkarnir kunnu gera sínar útrokningar.

Samanlagt hava hesir mjólkarbøndurnir innvigað millum 98,0% og 98,6% av samlaðu innvigingini hjá MBM tey seinru 5 árini. Tað merkir, at tað eru so at siga øll mjólkarvinnan við í greiningini hesi árini. Frá 1. juli 2019 verða øll mjólkarfjós í landinum rikin í smápartafeløgum.

Í almennu ársroknskapunum eru ikki serliga nógvar upplýsingar, men tær vísa, hvussu raksturin í høvuðsheitum hevur hilnast tey einstøku árini, og hvussu rákið í vinnuni er. Sum í øðrum vinnum eru tað nakrir mjólkarbøndur, ið klára seg væl, meðan tað hjá øðrum ikki gongur so væl.

Í greiningini framgongur, at í 2017 versnaðu rakstrarúrslitini, men hækkaðu aftur eitt sindur í 2018. Fyri árini 2012 - 2017 hevur ein serstakur stráfóðurstuðul verið latin landbúnaðarvinnuni. Tilsamans eru 24,0 mió.kr. játtaðar yvir 6 ár. Fyri at hesin stuðulin kann vera ein varandi hjálp hjá vinnuni er neyðugt, at ein partur verður brúktur at velta fyri. Men um tað skal muna nakað, skulu 500 hektarar veltast afturat sbr. Búnaðarstovuni. Við verandi veltistuðulsskipan, sum er 10 kr./fm, skulu 50 mió.kr. gjaldast í veltistuðli. Harafturat er neyðugt við uppdyrkingarvegum. Vanliga verður roknað við umleið 200 metrum fyri hvønn hektar. Tvs. at talan er um 10 km av uppdyrkingarvegi.

Hóast vinnan hevur fingið eyka stráfóðurstuðul, er samlaða úrslitið fyri øll 23 - 26 feløgini bert omanfyri 4,0 mió.kr. í 2015 og i 2016. Afturat stráfóðurstuðlinum er mjólkarprísurin til bøndurnar hækkaður við 0,45 kr./l síðani fyrst í 2015 til síðst í 2019. Tað sæst aftur hjá teimum, ið hava brotið roknskaparár. Men kraftfóðurprísurin er hækkaður í 2017 og í 2018, meðan stráfóðurprísurin er lækkaður pr. kg. Hesi tølini síggjast í eini nærri greining, ið JANUAR P/F hevur gjørt fyri 11 - 14 mjólkarbøndur.

Tann greiningin, sum JANUAR P/F hevur gjørt fyri 11 – 14 mjólkarbøndur, er gjørd út frá innanhýsis roknskapum hjá hesum mjólkarbøndum. Henda greiningin vísir m.a., at tann roknskaparposturin, ið nevnist "aðrar inntøkur" er lutfalslga høgur 2013, 2015, 2016, 2017 og í 2018. Hetta eru serliga inntøkur frá maskinrakstri o.t. Tað er okkurt ið bendir á, at fleiri bøndur troyta henda inntøkumøguleikan.

Tað er onki at ivast í, at um mjólkarvinnan skal kunna gerast effektiv, skal vinnan gerast nútíðarhóskandi. Tað merkir, at munandi íløgur skulu gerast í fjós, køstar o.t. Harafturat verður neyðugt at velta nógv, fyri at fáa nóg mikið av stráfóðri, men eisini fyri at kunna gagnnýta tøðini best møguligt. Um hetta skal kunna gjøgnumførast er alneyðugt, at ein heilt klár politiskt kós verður sett, og at allar kreftir í landbúnaðinum fylkjast um settu kósina. Her verður hugsað bæði um teir almennu og teir privatu stovnarnar, so sum Búnaðarstovuna, Búnaðargrunnin, MBM og Bóndafelag Føroya. Nú biogassvirkið, sum P/F Bakkafrost byggir á Sandvíkarhjalla, væntandi fer at taka ímóti slógvi og mykju seinri í ár, verður eisini neyðugt at gera íløgur í móttøkukøstar.

Í aðrari greining, sum JANUAR hevur gjørt, við støði í 11 - 14 innanhýsis roknskapum, eru fleiri áhugaverdar upplýsingar, sum lýsa gongdina í mjólkarvinnuni nærri. Báðar greiningarnar er á heimasíðuni hjá JANUAR P/F – www.januar.fo. Har eru eisini greinigar fleiri ár aftur í tíðina.

Tórshavn, tann 20. mars 2020

**P/F JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

**Yvirlit yvir feløg, sum eru við í greiningini**

Niðanfyri framgongur hvørji feløg talan er um. Eisini sæst hvat roknskaparár feløgini brúka. Eitt íognarfelag er í vinnuni, men í greiningini eru roknskapirnir hjá íognarunum brúktir, tí roknskapirnir hjá íognarfelagnum ikki eru almennir.

| | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal á roknskapum | 26 | 25 | 24 | 24 | 23 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Beitisgarður | X | X | X | X | X |
| Drívá | X | X | X | X | X |
| Garðurin í Búðini | X | X | X | X | X |
| Hoyvíksgarður | X | X | X | X | X |
| Miðstovugarðurin | X | X | X | X | X |
| MS Landbúnaður | X | X | X | X | |
| Heimistova | X | X | X | X | X |
| Í Grønunum | X | | | | |
| Ólavur Andreasen | X | X | X | X | X |
| Sólgarðar | X | X | X | X | X |
| ROJH | X | X | X | X | X |
| Oyrareingjagarður | X | X | X | X | X |
| Varmakelda | X | X | X | X | X |
| Uttastovugarðurin | X | X | X | X | X |
| Fjósið á Viðareiði | X | X | X | X | X |

| | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 | 2017/18 | 2018/19 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríðdalur | X | X | X | X | X |
| Hamarsgarður | X | X | X | X | X |
| Hvíthjallar | X | X | X | X | X |
| Húsgarður | X | X | X | X | X |
| Klettagarður | X | X | X | X | X |
| Müllersgarður | X | X | X | X | X |
| Tinggarðurin/Svartá | X | X | X | X | X |
| á Steinum | X | X | X | X | X |
| Torvlaðgarðurin | X | X | X | | |
| Eyðansstovugarður | X | X | X | X | X |
| Fjósið í Leirvík | X | X | X | X | X |

## Rakstrarroknskapirnir 2014 – 2018 (2014/15 – 2018/19)

Niðanfyri standandi talva vísir rakstrarroknskapirnar tilsamans hjá feløgunum í 1.000 kr.

| Tilsamans í 1.000 kr. | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Tál á roknskapum | 26 | 25 | 24 | 24 | 23 |
| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
| Bruttoúrslit | 16.888 | 18.375 | 20.521 | 18.632 | 18.132 |
| Starvsfólkakostnaður | -6.086 | -7.626 | -7.372 | -9.412 | -10.140 |
| Avskrivingar | -6.785 | -5.354 | -5.534 | -5.845 | -4.744 |
| **Rakstrarúrslit** | **4.017** | **5.396** | **7.615** | **3.376** | **3.248** |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dóttirfeløgum | 335 | 538 | 852 | 627 | 564 |
| Fíggjarligar inntøkur | 12 | 1.261 | 4 | 33 | 213 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -1.798 | -1.602 | -1.472 | -1.464 | -1.164 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **2.565** | **5.593** | **6.999** | **2.571** | **2.860** |
| Skattur | -533 | -1.039 | -1.345 | -381 | -434 |
| **Ársúrslit** | **2.033** | **4.554** | **5.654** | **2.191** | **2.426** |

Um omanfyri standandi roknskapir verða umarbeiddir eitt sindur sæst, at avlopið til fíggjarkostnað (rentur og avskrivingar) og skatt, tað sokallaða EBITDA, er sum niðanfyri víst:

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA tilsamans | 10.802 | 10.750 | 13.149 | 9.221 | 7.992 |
| Hægsta EBITDA | 1.025 | 1.382 | 1.924 | 1.502 | 1.048 |
| Lægsta EBITDA | -17 | -61 | -103 | -105 | -180 |

Sum tað sæst, so hevur bruttoúrslitið verið javnt hækkandi frá 2014 til 2016, men fall aftur í 2017 og aftur í 2018. Samstundir sæst, at starvsfólkakostnaðurin hevur verið hækkandi yvir tíðarskeiðið, tó við einum lítlum falli í 2016. Tað samlaða rakstrarúrslitið var lágt í 2014, 2017 og í 2018.

Nevnast skal, at í árunum 2012 - 2017 er eyka stráfóðurstuðul latin bóndunum. Hesin eyka stráfóðurstuðulin er játtaður fram til og við 2017. Tilsamans verða 24,0 mió.kr. goldnar úr Búnaðargrunninum til henda stuðulin.

Hesin stuðulin er ikki treytaður av nøkrum. Sum støðan er í vinnuni, eru tað sbr. Búnaðarstovuni, neyðugt at nýta stórar upphæddir at velta meiri bø fyri, tí nógvar mjólkarkvotur eru seldar seinastu árini. Hetta førir so við sær, at tann gamli bøurin, har mjólkarkvotan var, nú liggur óvirkin, meðan keypararnir ikki hava velt nóg mikið. Tí er neyðugt hjá nógvum mjólkarbóndum at keypa hoyggj úr útheiminum, serliga úr Danmark og Íslandi. Búnaðarstovan mælir til, at einir 500 hektarar verða veltir afturat. Higartil eru ikki nógv kúfóður velt síðani eyka stráfóðurstuðulin varð innførdur. Henda støðan hevur verið nógv umrødd, og nógv uppskot hava verið frammi um, hvussu hesin óvirkni bøurin kann gagnnýtast, men higartil er onki ítøkiligt gjørt við tað.

Tey seinastu árini eru nógvar broytingar hendar í mjólkarvinnuni. Talið á mjólkarbóndum er lækkað munandi. Seinastu 5 árini, sum henda greiningin fevnir um, er talið á smápartafelaøgum, sum reka mjólkarfjós lækkað úr 26 niður í 23. Síðani tá eru talið á mjólkarbóndum lækkað við 2 smápartafeløgum og harafturat eru tveir privatir mjólkarbøndur givnir. Litratalið, sum L/F MBM hevur tikið ímóti hesi árini hevur ligið millum 7.100.000 og 7.400.000 litrum av mjólk. Tá nøgdin er nøkulunda støðug, og talið á mjólkarbóndum lækkar, merkir tað sjálvsagt, at fjósini í meðal lata L/F MBM fleiri litrar.

Tað eru rembingar í mjólkarvinnuni, so tað er ikki óhugsandi, at tann gongdin, sum hevur verið, har fjósini gerast størri og størri, fer at halda fram. Í løtuni eru 4 mjólkitólmenni í landinum í trimum stórum og nýggjum fjósum. Tað tykist sum um mólkitólmennini klára millum 500.000 og 600.000 litrar hvørt árliga. Um øll vinnan varð umløgd, hevði tað verið nóg mikið við 14 mjólkitólmennum.

Niðanfyri eru bestu og vánaligastu ársúrslitini fyri tíðarskeiðið víst:

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Hægsta ársúrslit | 536 | 1.519 | 1.238 | 452 | 599 |
| Lægst úrslit | -811 | -166 | -51 | -200 | -253 |

Niðanfyri eru árligu meðalúrslitini víst:.

**Rakstrarroknskapir fyri meðalgarðin í 1.000 kr.**

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 650 | 735 | 855 | 776 | 788 |
| Starvsfólkakostnaður | -234 | -305 | -307 | -392 | -441 |
| Avskrivingar | -261 | -214 | -231 | -244 | -206 |
| **Rakstrarúrslit** | **154** | **216** | **317** | **141** | **141** |
| Inntøka frá kapitalpørtum í dótturf. | 13 | 22 | 36 | 26 | 25 |
| Fíggjarligar inntøkur | 0 | 50 | 0 | 1 | 9 |
| Fíggjarligir kostnaðir | -69 | -64 | -61 | -61 | -51 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **99** | **224** | **292** | **107** | **124** |
| Skattur | -20 | -42 | -56 | -16 | -19 |
| **Ársúrslit** | **78** | **182** | **236** | **91** | **105** |

Sum tað týðiliga framgongur, so hækkaði meðalúrslitið frá 2014 til 2016, í 2017 lækkaði meðalúrslitið heilt nógv, men er so økt nakað aftur í 2018. Starvsfólkakostnaðurin hevur verið javnt hækkandi seinastu 5 árini. Starvsfólkaskostnaðurin er hækkaður úr 19.500 kr. um mánaðin til 36.750. Hóast starvsfólkakostnaðurin er hækkaður, er hann enn sera lágur, tí í einum mjólkarfjósi krevst vanliga meiri enn eitt ársverk.

Niðanfyri sæst hvussu nógv meðalgarðurin hevur eftir til fíggjarkostnað tey einstøku árini. Eisini sæst, hvussu nógv tann besti garðurin hevur til fíggjarkostnað í teimum einstøku árunum, og hvussu nógv tann vánaligasti garðurin hevur til fíggjarkostnað. Nevnast skal, at tað ikki er tann sami garðurin, sum hevur tað frægasta úrslitið á hvørjum ári. Og heldur ikki er tað sami garður, sum er vánaligastur øll árini.

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 347497,3 1.048 |
|---|---|---|---|---|---|
| EBITDA | 415 | 430 | 548 | 384 | 347 |
| Hægsta EBITDA | 1.025 | 1.382 | 1.924 | 1.502 | 1.048 |
| Lægsta EBITDA | -17 | -61 | -103 | -105 | -180 |

Sum tað sæst frammanfyri, so er samlaða úrslitið lækkað munandi í 2017. Hóast vinnan hevur fingið 4,0 mió.kr. í stráfóðurstuðli, so er samlaða úrslitið lægri enn tað. Samlaða úrslitið hjá hesum 24 mjólkarbóndunum var bert 2,2 mió.kr. í 2017 (2017/18). Í 2018 (2018/19) hækkaði samlaða úrslitið nakað. Víst verður á, at í eini neyvari greining fyri 14 mjólkarbøndur, sum JANUAR hevur gjørt, høvdu hesir 14 mjólarbøndurnir 1,3 mió.kr. frá øðrum inntøkum, so sum maskinrakstri o.t.

Meðalprísurin á mjólkini er hækkaður nakað í tíðarskeiðnum, samstundis sum kraftfóðurprísurin pr. litur mjólk í meðal er lækkaður, men er tó hækkaður nakað aftur í 2018. Í hesi neyvari kanningin, sum JANUAR P/F hevur gjørt, grundað á 11 – 14 innanhýsis roknskapir, framgongur, at kraftfóðurprísurin í meðal er lækkaður úr 2,10 kr. pr. litur mjólk í 2012 niður í 1,69 kr./l mjólk í 2017, men hækkaði aftur til 1,76 kr/l mjólk í 2018. Við eini samlaðari mjólkarframleiðslu upp á 7,3 mió. litrar, merkir henda lækkingin ein minnikostnað upp á knappar 2,5 mió.kr. hjá mjólkarvinnuni.

Samanumtikið sæst, at mjólkarprísurin er hækkaður, prísurin á keyptum fóðri er lækkaður til 2017, men hækkaður aftur nakað í 2018, samstundis, sum fleiri bøndur hava økt um aðrar inntøkur. Hetta sæst eisini aftur, tí samlaða úrslitið fyri mjólkarvinnuna er øktist í 2015 og 2016, men lækkaði munandi í 2017 og í 2018.

Men nakrir kostnaðir eru tó øktir. Tað eru serliga lønir og viðlíkahald, meðan avskrivingarnar hækkaðu í tíðarskeiðnum 2013 – 2017, men lækkaðu aftur í 2018. Lønirnar eru øktar, av tí, at tær millumrokningarnar, sum bøndur fingu við felagið, tá raksturin varð lagdur í eitt felag við ársenda 2006, nú eru afturgoldnar hjá fleiri bóndum. Tað eru fleiri bøndur, sum hava livað av hesum millumrokningum, men nú mugu teir fáa løn frá feløgunum. Fjósini eldast og slítast, tí økist viðlíkahaldskostnaðurin. Avskrivingarnar lækkað av tí at íløgurinar í materiellu støðisogina eru lækkandi og tí at mjólkarkvoturrnar eru avskrivaðar niður á eitt mett restvirði hjá fleiri mjólkarbøndum.

Nógv fjós í vinnuni er gomul, nøkur eru heilt gomul og niðurslitin, tí er neyðugt við stórum viðlíkahaldskostnaði. Nakrar íløgur eru gjørdar í serstakliga leysafæ, men eisini í mjólkarkvotur, sum gera, at avskrivingarnar eru hækkaðar.

Í stabbamyndini niðanfyri sæst, hvussu kostnaðirnir hava verið seinastu árini. Samlaði stabbin vísir bruttoúrslitið hjá meðalgarðinum. Tað sæst týðiliga, at samlaða bruttoúrslitið hækkaði árini 2014 – 2016, men lækkaði so aftur í 2017 og í 2018.




## Fíggjarstøðurnar við roknskaparársenda (31/12 og 30/6)

Niðanfyri eru ognirnar tilsamans vístar hjá hesum mjólkarbóndunum.

| | **Fíggjarstøða 30/6 og 31/12** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 2014/15 | 2015/16 | 2016/17 | 2017/18 | 2018/19 |
| OGN | og 2014 | og 2015 | og 2016 | og 2017 | og 2018 |
| Mjólkarkvotur | 36.071 | 33.587 | 32.326 | 30.463 | 29.719 |
| Good-will | 2.773 | 2.743 | 2.842 | 2.780 | 2.747 |
| **Immateriell støðisogn** | **38.844** | **36.330** | **35.169** | **33.242** | **32.466** |
| | | | | | |
| Bygningar | 5.632 | 9.072 | 9.809 | 4.741 | 4.369 |
| Rakstrargøgn | 13.762 | 15.208 | 16.363 | 16.160 | 14.874 |
| Kríatúr | 5.267 | 5.591 | 5.166 | 5.203 | 5.301 |
| **Materiell støðisogn** | **24.660** | **29.871** | **31.338** | **26.103** | **24.544** |
| | | | | | |
| Kapitalpartar | 1.362 | 350 | 364 | 407 | 400 |
| Onnur virðisbrøv | 30 | 40 | 40 | 90 | 50 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **1.392** | **390** | **404** | **497** | **450** |
| | | | | | |
| **Støðisogn tilsamans** | **64.896** | **66.590** | **66.910** | **59.843** | **57.460** |

Her sæst, at mjólkarkvoturnar hjá hesum mjólkarbóndunum eru lækkaðar við umleið 6 mió.kr. hesi 5 árini. Ein partur av frágreiðingini er, at nakrir bøndur hava selt mjólkarkvotuna, tí teir eru um at gevast í vinnuni. Í nøkrum førum eru mjólkarkvoturnar seldar fyri eina lægri upphædd, enn tær vórðu keyptar fyri. Ein onnur frágreiðing er, at mjólkarkvoturnar eru niður- og/ella avskrivaðar. Hóast tað, so er samlaða virðið á mjólkarkvotunum góð 40% av samlaðu støðisognini í 2017 og í 2018. Í 2009 var virðið á mjólkarkvotunum knøpp 75% av samlaðu støðisognini.

Íløgurnar í fastogn og rakstrartól hava verið sera lítlar hesi árini.

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Íløgur í materella støðisogn | 11.349 | 10.565 | 7.001 | 610 | 3.185 |

Ognin hjá meðalmjólkarfjósinum er henda:

**Fíggjarstøða 30/6 og 31/12**

| OGN | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mjólkarkvotur | 1.387 | 1.343 | 1.347 | 1.269 | 1.292 |
| Good-will | 107 | 110 | 118 | 116 | 119 |
| **Immateriell støðisogn** | **1.494** | **1.453** | **1.465** | **1.385** | **1.412** |
| | | | | | |
| Bygningar | 217 | 363 | 409 | 198 | 190 |
| Rakstrargøgn | 529 | 608 | 682 | 673 | 647 |
| Kríatúr | 203 | 224 | 215 | 217 | 230 |
| **Materiell støðisogn** | **948** | **1.195** | **1.306** | **1.088** | **1.067** |
| | | | | | |
| Kapitalpartar | 52 | 14 | 15 | 17 | 17 |
| Onnur virðisbrøv | 1 | 2 | 2 | 4 | 2 |
| Egin partabrøv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **54** | **16** | **17** | **21** | **20** |
| | | | | | |
| **Støðisogn tilsamans** | **2.496** | **2.664** | **2.788** | **2.493** | **2.498** |
| | | | | | |
| Rávørur og hjálpitilfar | 7 | 7 | 9 | 9 | 8 |
| Vøru- og tænastuogn | 108 | 102 | 111 | 123 | 178 |
| Áogn hjá atknýttum feløgum | 38 | 87 | 49 | 41 | 59 |
| Virðisbrøv | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 1 | 1 | 17 | 2 | 14 |
| Onnur áogn | 120 | 117 | 177 | 208 | 187 |
| **Áogn tilsamans** | **275** | **316** | **363** | **384** | **446** |
| | | | | | |
| Peningur | 198 | 201 | 322 | 272 | 273 |
| | | | | | |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **473** | **517** | **686** | **656** | **719** |
| | | | | | |
| **OGN TILSAMANS** | **2.969** | **3.181** | **3.473** | **3.149** | **3.217** |

Tað framgongur týðiliga, at tann immateriella ognin (mjólkarkvotan) er lækkað (tann blái parturin av stabbanum) seinastu árini, meðan íløgan í maskinur og tól er hækkað ájavnt við gjørdu avskrivingarnar. Ognin í umferð (tann guli parturin av stabbanum), tvs útistandandi hjá viðskiftafólki og innistandandi peningur í peningastovnum hevur verið støðug. Tann samlaða ognin er tó hækkað nakað í 2015 og í 2016, men er lækkað aftur í 2017. Ein lítil øking sæst í 2018.



Skyldurnar tilsamans hjá hesum mjólkarbóndunum eru vístar niðanfyri:

**Fíggjarstøða 30/6 og 31/12**

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **SKYLDUR** | | | | | |
| Partapeningur | 2.205 | 2.125 | 2.045 | 2.045 | 1.965 |
| Uppskrivingargrunnar | 92 | 92 | 40 | 40 | 40 |
| Flutt úrslit | 20.419 | 24.681 | 28.577 | 29.738 | 31.452 |
| **Eginogn tilsamans** | **22.716** | **26.898** | **30.662** | **31.823** | **33.457** |
| | | | | | |
| Útsettur skattur | 2.912 | 3.353 | 4.027 | 4.048 | 4.193 |
| Aðrar avsetingar | 126 | 322 | 322 | 275 | 205 |
| **Avsetingar tilsamans** | **3.038** | **3.675** | **4.348** | **4.323** | **4.397** |
| | | | | | |
| Langfreistað skuld | 21.804 | 20.507 | 20.127 | 14.988 | 13.667 |
| | | | | | |
| Stuttfreistað skuld | 2.930 | 3.423 | 4.593 | 3.992 | 3.623 |
| Bankaskuld | 277 | 146 | 337 | 409 | 102 |
| Vøru- og tænastuskuld | 5.166 | 5.074 | 5.416 | 5.380 | 4.714 |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstandandi | 16.184 | 15.100 | 12.806 | 8.700 | 8.652 |
| Partafelagsskattur | 577 | 500 | 589 | 719 | 476 |
| Tíðaravmarkingar | 38 | 413 | 493 | 0 | 24 |
| Onnur skuld | 4.462 | 3.782 | 3.992 | 5.252 | 4.887 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 29.635 | 28.438 | 28.225 | 24.452 | 22.478 |
| | | | | | |
| **Skuld tilsamans** | **51.438** | **48.945** | **48.352** | **39.440** | **36.145** |
| | | | | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **77.193** | **79.518** | **83.363** | **75.586** | **73.999** |

Trygdarleikastigið, sum sigur frá, hvussu stóran part eginognin fíggjar av samlaðu ognini hjá hesum mjólkarbóndunum hesi árini, er:

| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Trygdarleikastig | 29,4% | 33,8% | 36,8% | 42,1% | 45,2% |

Eginognin er økt samstundis, sum bæði tann langfreistaða og tann stuttfreistaða skuldin eru lækkaðar, og tí er trygdarleikastigið hækkað. Tað sæst, at trygdarleikastigið er hækkað øll tey seinastu 5 árini. Tað kann kanska tykjast at vera eitt gott tekin, men um hugt verður at íløgunum í vinnuni, og hvussu fíggingin er samansett sæst, at tað er fáar íløgur gjørdar hesi árini, og at millumrokningarnar við eigararnar er lækkað munandi, úr 16,2 mió.kr. til 8,7 mió.kr. Tvs. at so at siga umleið helmingurin av lækkingini í skuldini stavar frá, at eigararnir hava goldið millumrokningarnar niður.

Um lækkaða millumrokningin verður samanhildin við "Starvsfólkakostnaðin", er tað nakað, sum bendir á, at bøndurnir lutvíst hava livað av millumrokningini, heldur enn at fáa sær løn. Tí eru rakstrarroknskapirnir betri enn teir áttu at verið, um øll arbeiðsmegin varð lønt. Hjá nøkrum mjólkarbóndum sæst, at hesar millumrokningarnar skjótt eru brúktar. Tað fer at merkja, at í framtíðini mugu bøndurnir eisini fáa meiri í løn frá feløgunum. Í eini neyvari grein, sum P/F JANUAR hevur gjørt sæst, at henda gongdin hevur tikið dyk á seg seinastu árini.

Myndin er greiðari niðanfyri, har skuldin hjá meðalmjólkarbóndanum er víst:

**Fíggjarstøða 30/6 og 31/12**

| **SKYLDUR** | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Partapeningur | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 |
| Uppskrivingargrunnar | 4 | 4 | 2 | 2 | 2 |
| Flutt úrslit | 785 | 987 | 1.191 | 1.239 | 1.367 |
| **Eginogn tilsamans** | **874** | **1.076** | **1.278** | **1.326** | **1.455** |
| | | | | | |
| Útsettur skattur | 112 | 134 | 168 | 169 | 182 |
| Aðrar avsetingar | 5 | 13 | 13 | 11 | 9 |
| **Avsetingar tilsamans** | **117** | **147** | **181** | **180** | **191** |
| | | | | | |
| Langfreistað skuld | 839 | 820 | 839 | 624 | 594 |
| | | | | | |
| Stuttfreistað skuld | 113 | 137 | 191 | 166 | 158 |
| Bankaskuld | 11 | 6 | 14 | 17 | 4 |
| Vøru- og tænastuskuld | 199 | 203 | 226 | 224 | 205 |
| Skuld til atknýtt feløg/nærstanda | 622 | 604 | 534 | 362 | 376 |
| Partafelagsskattur | 22 | 20 | 25 | 30 | 21 |
| Tíðaravmarkingar | 1 | 17 | 21 | 0 | 1 |
| Onnur skuld | 172 | 151 | 166 | 219 | 212 |
| Stuttfreistað skuld tilsamans | 1.140 | 1.138 | 1.176 | 1.019 | 977 |
| | | | | | |
| **Skuld tilsamans** | **1.978** | **1.958** | **2.015** | **1.643** | **1.572** |
| | | | | | |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | **2.969** | **3.181** | **3.473** | **3.149** | **3.217** |




| | 2014/15 og 2014 | 2015/16 og 2015 | 2016/17 og 2016 | 2017/18 og 2017 | 2018/19 og 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 874 | 1.076 | 1.278 | 1.326 | 1.455 |
| Millumrokning við nærstandand | 622 | 604 | 534 | 362 | 376 |
| Ogn hjá bóndunum tilsamans | 1.496 | 1.680 | 1.811 | 1.688 | 1.831 |

Omanfyri er samlaði ágóðin hjá bóndunum í feløgunum. Her sæst, at eginognin og millumrokningin tilsamans hava verið sera støðug hesi árini, men er lækkað í 2017, men hækkað aftur í 2018. Tað sæst, at millumrokningarnar eru lækkaðar, meðan eginognin er hækkað. Tað merkir, at bøndurnir hava heldur hevað av millumrokningini enn at útgjalda sær løn. Sjálvsagt verður skatturin lægri, men uppsparingin verður spakuliga brúkt.

Sum heild kann sigast, at greiningin vísir, at raksturin er batnaður nakað seinru árini, tó er rakstrarúrslitið lækkað nógv í 2017 og hækkað nakað aftur í 2018. Tað er sannlíkt tann batnandi gongdin árini frammanundan kemst av, at stráfóðurstuðulin hækkaði og at aðrar inntøkur hækkaðu, samstundis sum fóðurprísurin lækkaði. Tó eru lønir, viðlíkahald av fjósum og avskrivingar hækkað.

Tað merkir, at tað ikki eru rationaliseringar, sum hava ført til eitt betri rakstrarúrslit. Skal mjólkarvinnan kunna gerast effektivari, er neyðugt við munandi íløgum í nýggj nútíðarfjós, samstundis sum neyðugt er at velta meiri og gagnnýta ta veltu jørðina betur.

**Hvar er mjólkarframleiðslan í Føroyum?**

Seinastu árini eru alsamt færri mjólkarbøndur í Føroyum. Men mjólkarframleiðslan hevur tó verið støðug seinastu mongu árini. Í niðanfyri standandi talvu sær, hvussu stórur partur av mjólkarframleiðsluni er í teimum ymisku økjunum í Føroyum, og hvussu framleiðslumynstri er broytt.

**Innvigingar í 1.000 litrum**

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 815 | 773 | 683 | 677 | 802 |
| Eysturoy | 1.560 | 1.588 | 1.596 | 1.594 | 1.625 |
| Streymoy | 3.498 | 3.803 | 3.588 | 3.669 | 3.718 |
| Vágar | 373 | 303 | 196 | 172 | 169 |
| Sandoy | 1.081 | 1.067 | 1.123 | 1.046 | 1.054 |
| Suðuroy | 114 | 209 | 175 | 223 | 17 |
| | 7.442 | 7.744 | 7.361 | 7.382 | 7.384 |

Framleiðslan í Norðuroyggjum lækkaði í árunum 2015 -2018, men er so hækkað aftur. Framleiðslan í Eysturoynni er rættiliga støðug øll árini, meðan framleiðslan í Streymoynni hækkaði fram til 2016 fyri síðani at lækka nakað í 2017 og síðani hækka aftur. Í Vágum er framleiðslan lækkað nógv síðani 2015. Framleiðslan á Sandoynni er støðug, meðan framleiðslan í Suðuroy er hildin uppat.

Lutfalsliga býtið sæst á niðanfyri standandi stabbamynd. Her sæst, at framleiðslan í Streymoynni, sum bert er í Tórshavnar kommunu, nú er hægri enn 50%.

